# Spurningar og svar pr. 19. okt. 2021

## Spurningar:

1) Stk. 4.4 Kann Gjaldstovan/Landið av sínum eintingum brúka hesa rammuavtalu til øll, eisini privat (Næmingar)?
   a. Stk. 4.5 Har umframt at ikki verða bundin at keypa nakað?
2) Stk. 6.10 Veitingartíðin er sera stutt, tá ið vit hugsa um at allir veitarar hava stórar avbjóðingar við at veitar vørur sum heild og hetta er globalt
   a. Eisini er treyt um goymslu, tá ið man hyggur at veitingar tí, men Gjaldstovan/Landið kann smb Stk. 4.5, loyvi sær ikki at keypa nakað.
3) Stk. 10.1 – Prísjavning, her siga tit at prísurin einans kann broytast 1. Januar og ikki meira enn 1,5%, men tá ið marknaðurin er sum hann er í løtuni, har man vantar príshækking upp í 50% innan fyri næsta ári, so kann ongin verða við, eisini eru frakt prísirnir hækkandi, so her er nógv, ið kann ávirka prísin, so veitarin man gerð avtaluni í Føroyum, ikki hevur ávirkan á.
4) Minstu krøv til teldur, líkjast nógv at verða frá einum framleiðarar.
   a. Hví skal tað verða on-board netkort? Er tað ikki gott nokk við einum adaptara, men kann hava aftrat um neyðugt (Sera fá í brúka onboard netkort)
   b. Hví avmarkað seg til HDMI ella Display Port? Hvat við USB-C?
   c. Vanlig telda skal klára tveir skermar við WQHD (3440x1440), tað er hvat ein Premium telda klárar og hevur ein brúkarar pláss á borðinum fyri tveimum so stórum skermum.
   d. Hví krav um EPEAT Gold, hvat við EPEAT Silver, TCO og/ella Energy Star
   e. Kraftig/Workstation skal hava "NVIDIA RTX A2000 4 GB RAM", er hetta ikki at avmarkað seg til ein framleiðarar ella fáa, líkist sum krøv eru klipt frá einum veitara
   f. O.s.v.
5) Ynskja at fáa freistina longda við 14 døgum, tí vit eru rakt av heystferiu, hesa vikuna og veitarar eru raktir av heystferiu í komandi viku.

## Svar:

### AD 1)

Gjaldstovan kann við rundskrivinum gera bindandi rammusáttmálar fyri allar stovnar undir landinum. Í teimum førum, at kommunur vilja luttaka, kunnu vit eisini gera hetta fyri kommunur. Vit gera ikki avtalur fyri privat. Tó so, er talan um eina myndugleikauppgávu, at keypa teldur næminganna vegna, kann hetta verða fevnt av avtaluni.

Tá talan er um nøgd í 4.5, so kunnu vit ikki tryggja eina ávísa nøgd. Vit kunnu tryggja, at stovnar undir landinum eru bundnir av rundskrivinum, sum viðførir, at teir skulu keypa umvegis avtaluna. Umframt, at vit hava í útboðstilfarinum eitt boð uppá hvussu verður keypt.

Viðmerkjast skal, at Sjúkrahúsverkið luttekur ikki í avtaluni.

**AD 2)**

Talan er um uppskot, kann ein ikki liva upp til veitingartíðina, so kann talan verða um samráðing. Tá tað er sagt, og um allir veitarar hava stórar avbjóðingar, eru allir í sama báti, og mugu bjóða inn við tí veruleika teir liva í, t.d. við at liggja inni við einari goymslu. Hetta er eitt av mongum parametrum, sum vit hava spurt inn til, og verður partur av vektingini.

**AD 3)**

Veitarin kennir best marknaðin. Viðkomandi má so bjóða í mun til tann veruleika viðkomandi er í.

Pkt. 9.6 vísur til samstarv. Og um annar parturin ikki klárar at liva upp til avtaluna, eisini tá talan er um prís, so skal boðast frá. Og er talan um viðurskifti, ið hvørgin av pørtunum hava ávirkan á, so er møguleiki fyri at at samráða seg til eina loysn. Pkt. 10.1 er okkara uppskot og útganstøðið.

**AD 4)**

Vit síggja okkum ikki einigan í, at krøvini eru gjørd út frá einum framleiðara. Vit hava brúkt HP sum dømi, men tað stendur eisini í vørulistanum, at talan er um dømi, og at vit ikki hava lagt okkum á nakað ávíst merki. Krøvini skulu síggjast sum minimum krøv, og kann man liva upp til krøvini við tilsvarandi produkti, so er tað gott nokk.

- **a)** On-board netkort hevur ongantíð víst seg at vera ein trupulleiki, tískil framvegis eitt krav.
- **b)** Um USB-C portrið stuðlar Alternate Mode t.d. Display Port Alt Mode, so er tað ok.
- **c)** Fleiri stovnar brúka í dag tveir 34” skermar, og sum nevnt í vørulistanum, so er kravið galdandi tá teldan er dokkað.
- **d)** EPEAT Gold hevur ongantíð víst seg at vera ein trupulleiki, tískil framvegis eitt krav.
- **e)** Talan er um minsta krav, ikki absolutt krav um merki. Um man kann koma við tilsvarandi, so er tað gott nokk.

**AD 5)** *Allar tíðarfreistir verða longdar við við 14 døgum.*